FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
29. oktober 2018
Mál: 18/00534-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 22/2018

**Svar til § 52a fyrispurning nr. 22/2018 frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni**

**Fyrispurningur um virðisøking av fiski, settur Høgna Hoydal, landsstýrismanni, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at virðisøkingin av føroyskum fiski fer fram, áðrenn fiskurin verður fluttur av landinum?

**Svar:**

Nógv átøk til at fremja virðisøkingina eru longu framd í verandi lóg um fyrisiting av sjófeingi, men enn eru nøkur eftir at fremja. Hesi átøk hevur landsstýrismaðurin framt ella hevur í hyggju at fremja fyri at vaksa um áhugan at virðisøkja fisk í Føroyum:

1. Krav um landing í Føroyum
2. Krav um alt í land
3. Útboð av veiddum fiski
4. Útboð av rættindum
5. Krav um, at skip skulu vera føroysk
6. Umsitingarætlanir, harvið møguleika fyri MSC góðkenning av fiskastovnum
7. Fígging av innkeypi
8. Fígging av útflutningskreditti
9. Øking av játtan til Fiskivinnuroyndir
10. Skipan av MATÍS líknandi skipan
11. Menningarkvotur

Ad. 1. Í lógini um fyrisiting av sjófeingi er í dag eitt krav, at allur fiskur, sum er veiddur við føroyskum rættindum, skal landast í Føroyum. Í kunngerðini hesum viðvíkjandi eru nøkur fá undantøk, sum ikki hava tað stóra at siga fyri heildina. At alt skal landast í Føroyum ger, at fiskurin er tøkur hjá virkjum í Føroyum, og møguleikarnir fyri virðisøking av fiskinum eru stórir fyri føroysku virkini.

Ad. 2. Krav um, at alt av fiskinum skal í land í Føroyum stendur í lógini um fyrisiting av sjófeingi, men er hetta ikki framt enn. Tá hetta krav verður framt, verður meira hjá føroyskum virkjum at

virka, og tí fer hetta at geva meira virðisøking av fiski í Føroyum. Her er galdandi, at tá alt kemur í land, verður vøran tøk hjá føroyskum virkjum. Restrávøra kann altíð fara til fiskamjøl og lýsi, men tá vøran verður tøk á landi, fáa smærri virki, sum hugsa nýskapan og virðisvøkstur møguleika fyri at koma framat rávøruni (hon kemur til lands).

Ad. 3. Í lógini um fyrisiting av sjófeingi er krav um, at 25% av øllum veiddum fiski skal bjóðast út til føroysk virki at bjóða uppá. Hetta gevur møguleika hjá øllum virkjum at fáa rávøru, og leggur tað eisini upp til, at meira virðisøking verður á landi.

Ad. 4. Útboð av rættindum ger, at virkir kunnu bjóða uppá rættindi, og tí kunnu hesi tryggja sær rávøru og tí fáa meira virðisøking á landi.

Ad. 5. Kravið um, at skipini, sum fiska upp á føroysk rættindi, skulu vera átt av føroyingum ger eisini, at meira virðisøking kann vera á føroyskum virkjum.

Ad. 6. Ein orsøk til, at nakað av fiski fer óvirkað av landinum er, at føroyskur fiskur ikki er fiskaður burðardygt, og tí ikki kann fáa MSC góðkenning. Um fiskurin fer óviðgjørdur til ES, kemur hann í land sum onnur rávøra, og upprunin "hvørvur". Um vit fingu eina umsitingarætlan fyri okkara botnfisk, hevði tað verið møguligt at fingið hendan fiskin MSC góðkendan, og harvið hevði borið til at víst á, at øll framleiðslan er burðardygg, tí rávøran er veidd burðardygt. Hetta hevði so givið møguleikar fyri størri virðisskapan á føroyskum fiskavirkjum.

Ad. 7. Henda fígging skal verða skipað sum ein kredittur, sum skal vera bíligari enn verandi bankafígging av kassakreditti, og hetta kann gera føroysk virkir kappingarfør, tá tey keypa frystan fisk.

Ad. 8. Hesin útflutningskredittur skal eisini vera bíligari enn verandi bankafígging av kassakreditti, og hetta kann gera føroysk virkir kappingarfør, um tey ikki skulu gjalda so høgan kostnað, fyri at fáa teirra vørur útfluttar.

Ad. 9. Játtanin til Fiskivinnuroyndir er økt nógv seinnu árini og hevur hetta havt við sær, at fleiri nýggj hugskot mennast í føroysku fiskivinnuni á landi, sum viðførir størri virðisøking.

Ad. 10. Ætlanin er í framtíðini at gera eina skipan eins og tann, sum er galdandi í Íslandi við MATÍS. Hetta er ein stovnur, sum virkar fyri at menna vørur úr fiskarávøru. Hetta kundi hjálpt nógv til at fingið eina størri virðisøking av føroyska fiskinum.

Ad. 11. Menningarkvoturnar, sum vórðu latnar á fyrsta sinni í summar, vórðu latnar við denti á virðisøking. Tí hava menningarkvoturnar stóran týdning fyri at fáa meira virðisøking á landi.

Samanumtikið kann sigast, at nógv er gjørt í lógini um fyrisiting av sjófeingi til tess at fáa meira virðisøking á landi í Føroyum, men enn er nakað eftir at gera.

**Høgni Hoydal**
*landsstýrismaður*